# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*»Arjen dugir alt, og eg seti hann oman fyri allar aðrar í heiminum«*

*Marco Van Basten um Arjen Robben*

# Kravtíðirnar eru ásettar

**Nú er greitt, hvussu skjótt ymsu rógvararnir skulu rógva, um tey skulu vinna sær luttøku í NM-kappingini í innandurarógving**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

25. november verður NM-undankapping á Giljanesi, har átta føroyskir rógvarar kunnu vinna sær rætt til luttøku í NM-kappingini.

Í NM-kappingini eru ikki færri enn 20 ymsir bólkar, sum kappast verður í, og tá føroyska kappingin ikki er eins neyvt bólkað, er ein beinleiðis samanbering tí ikki altíð eins løtt. Hinvegin eru nakrar kravtíðir settar til luttøku, og hesar fer Róðrarsambandið at meta seg eftir, tá føroysku luttakararnir skulu veljast. Markið fyri føroysku luttøkuna er tó átta rógvarar, og tí er ikki víst, at luttøkan er vís, fyri tað um kravtíðin verður rokkin. Eru fleiri enn átta rógvarar, sum røkka kravtíðini, verða tíðirnar hjá hesum tó samanhildnar við kravtíðirnar, og tað er tí púrasta upp til RSF at velja út átta bestu rógvararnar.

## Kravtíðirnar

| | |
|---|---|
| Gentur 12 ár og yngri (500m)<br>Kravtíð: 2:10,0 | Kvinnur lættvekt 19 – 22 ár (2000m)<br>Kravtíð: 7:40,0 |
| Dreingir 12 ár og yngri (500m)<br>Kravtíð: 2:05,0 | Menn lættvekt 19 – 22 ár (2000m)<br>Kravtíð: 6:40,0 |
| Gentur 13 – 14 ár (1000m)<br>Kravtíð: 4:00,0 | Kvinnur tungvekt 23 – 29 ár (2000m)<br>Kravtíð: 7:25,0 |
| Dreingir 13 - 14 ár (1000m)<br>Kravtíð: 3:25,0 | Menn tungvekt 23 – 29 ár (2000m)<br>Kravtíð: 6:25,0 |
| Gentur 15 – 16 ár (2000m)<br>Kravtíð: 7:50,0 | Kvinnur lætttvekt 23 – 29 ár (2000m)<br>Kravtíð: 7:35,0 |
| Dreingir 15 – 16 ár (2000m)<br>Kravtíð: 6:50,0 | Menn lættvekt 23 – 29 ár (2000m)<br>Kravtíð: 6:35,0 |
| Gentur 17 – 18 ár (2000m)<br>Kravtíð: 7:40,0 | Kvinnur tungvekt 30 – 39 ár (2000m)<br>Kravtíð: 7:30,0 |
| Dreingir 17 – 18 ár (2000m)<br>Kravtíð: 6:40,0 | Kvinnur lættvekt 30 – 39 ár (2000m)<br>Kravtíð: 7:40,0 |
| Kvinnur tungvekt 19 – 22 ár (2000m)<br>Kravtíð: 7:30,0 | Menn lættvekt 30 – 39 ár (2000m)<br>Kravtíð: 6:40,0 |
| Menn tungvekt 19 – 22 ár (2000m)<br>Kravtíð: 6:30,0 | |



*Átta føroyskir rógvarar kunnu nú vinna sær rætt til luttøku í NM-kappingini, sum verður í Gladsaxe*

# SÍ og KÍF møtast í Sørvági

**SÍ og KÍF møtast í meistaradeildini hjá kvinnum í kvøld. Bæði liðini skulu vinna dystin, tí umráðandi er hjá báðum at hála inn á oddaliðini.**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Dystur verður í Sørvági í kvøld í meistaradeildini hjá kvinnum. Her møtast bestu liðini hjá SÍ og KÍF, og júst hesi bæði liðini hava ikki havt ta bestu gongdina síðstu dystirnar. KÍF hevur ikki vunnið nakran dyst, síðani tær vunnu á júst SÍ í fyrsta umfari. Hjá SÍ hevur heldur ikki gingið heilt eftir vild. Tær hava vunnið tveir dystir, men í tveimum teimum síðstu dystunum hava tær tapt fyri tveimum av oddaliðunum, nevniliga TB og ÍF.

Nú hava hesi bæði liðini møguleikan at draga eitt sindur inn á oddaliðini. Um SÍ vinnur, so koma tær uppá seks stig, og sostatt vera tær bert fýra stig aftanfyri Drátt á fyrsta plássi. Hjá KÍF ræður eisini um at vinna. Tær hava ikki spælt serliga væl síðstu dystirnar, og tí skulu tær prógva, at tær eiga at liggja longri uppi á stigatalvuni, enn tær gera í løtuni.

Dysturin millum SÍ og KÍF verður í fimleikahøllini í Sørvági í kvøld kl. 19.00.

# Aktiv marknaðarføringí Hoyvík

**Tað hevur sína orsøk, tá hondbóltsspælarar í H71 spæla við óvanligum tølum á bakinum, samstundis sum búnarnir hava skift lit í vetur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

H71 líkist ikki akkurát sær sjálvum í ár. Vanliga hvíti búnin er í ár svartur, og tølini á bakinum eru ikki í teirri raðfylgju, sum tølini hjá hondbóltsspælarum. Tað kundi sæð út sum eitt skemtiligt átak frá spælarunum, men tað er kortini ein meining í galskapinum.

Undan hesum kappingarárinum gjørdu Kall og H71 nevnliga sponsoravtalu, og búnin og tølini eru beinleiðis partur av hesum.

Svarti búnin saman við orangjulittu tølunum eru nevnliga litirnir, sum Kall ger nýtslu av í lýsingum sínum. Og tølini á bakinum eru øll í 50'- og 70'unum. Altso byrjunartølini hjá fartelefonfeløgum hjá Kalli.

Hartil spæla allir spælararnir í orangjulittum skógvum, soleiðis at heildarmyndin av liðnum er í so neyvum samsvari við høvuðsstuðulin, sum tilber.

### Nýggjur trendur

Og helst er talan um ein nýggjan trend innan marknaðarføring í Føroyum. Fyri stuttum sóu vit Kaupthing og HB gera nýggja sponsoravtalu, har tað av álvara varð lagt upp til eitt munandi meira aktivt samstarv, enn vanligt hevur verið. Millum annað við at navngeva HB-skýlið, eins og events av ymsum slag skulu fyriskipast til heimadystirnar hjá føroyameistarunum.

Upphæddirnar, sum Kall og Kaupthing rinda til ávíkavist HB og H71 eru ikki upplýstar, men sum skilst eru hesar væl omanfyri tað, sum vanligt hevur verið í Føroyum. Og tí er einki at ivast í, at hetta er nakað, sum fyritøkurnar síggja sum ein stóran møguleika í royndunum at branda fyritøkurnar. Ein branding, sum avgjørt eisini kann koma feløgunum til góðar, um hesi samstundis megna at optimera sína úrtøku úr sáttmálunum.



*Tølini á bakinum eru í Kall-litum og í Kall-raðfylgju*